## Ferðsluóhapp í Eysturoynni

*Ein bilur við sjey fólkum fór út av vegnum í krossinum har vegurin til Æðuvíkar og Rituvíkar møtast*

Tað var beint áðrenn klokkan tvey leygarnáttina, at løgreglan í Runavík fekk boðini um ferðsluóhappið.

Sambært vakthavandi á støðini í Runavík, so kom bilurin vestaneftir og skuldi fara antin til vinstru ella høgru, men fór beint ístaðin. Tíverri fyri hann, var eingin vegur, har hann koyrdi, og tískil endaði hann við síðuna av vegnum.

Løgreglan í Runavík staðfesti, tá komið var á staðið, at meginparturin av teimum, sum vóru í bilinum vóru ávirkaði av rúsdrekka — eisini førarin.

Sjúkrabilurin var eisini á staðnum eftir trimum fólkum, sum høvdu fingið snuddir. Sum skilst á vakthavandi var ikki talan um ógvusligar snuddir.

## Breyt hurð við kúbeini

*Ein hurð varð brotin inn við kúbeini í Nólsoy fríggjadagin*

Løgreglan í Havn var í Nólsoy seinnapartin fríggjadagin. Onkur hevði verið eitt sindur illur í sær, og hevði lagt á hurðina hjá einum ørðum — við einum kúbeini.

Hurðin toldi, sum verða man ikki, harðliga gestin, og eigaramaðurin helt tað heldur ikki vera so stuttligt, so hann boðaði løgregluni frá hendingini.

Løgreglan fór út til Nólsoyar – við Rituni – og gjørdi tað, sum gerast skuldi fyri at uppklára máli, og tann, sum hevi gjørt skaðan kann vænta sær eina bót.

## Festu í Margarinfabrikkina

*Løgreglan fekk ikki at vita, hvør tað var, sum festi í ein plastrút á Margarinfabrikkini*

Um vikuskiftið fekk løgreglan boð um, at tað var eldur í á Margarinfabrikkini í Havn.

Sum skilst á vakthavandi á støðini í Havn, so var eldur settur á ein plexiglasrút. Eldurin var kortini sløktur beinanvegin, og tí stóðst eingin skaði av óhappinum.

Eini 40 fólk vóru á Margarinfabrikkini tá eldurin kom í, men so »løgið« tað ljóðar, so visti eingin av teimum, at siga løgregluni, hvør tað var, sum hevði fest í. Tí fór løgreglan avstað við óforrættaðari sak.

Annars fekk løgreglan í Havn eisini boð um, at tveir mans vóru roknir í toppin á hvør øðrum. Annar teirra meldaði fyri at fáa eina umbering frá hinum, og tað eydnaðist. Meir verður ikki gjørt við tað málið.

## Rendi á og rýmdi

*Ein maður stakk av frá løgregluni, eftir hann hevði verið fyri einum ferðsluóhappi, men løtu seinni varð hann fangaður av hundinum*

Tað loysir seg ikki hjá øllum at stinga av frá ferðsluóhappi. Tað kann ein bilførari í Havn sanna eftir at hann varð handtikin sunnumorgunin.

Hann var fyri einum ferðsluóhappi á krossinum við R. C. Effersøesgøta og Eystara Ringveg (í stóru rundkoyringini, blðm.). Løgreglan fekk boð um óhappi, men tá hon kom á staðið fekk maðurin brádliga skund og rann avstað.

- Vit beittu hundin eftir honum, og tað bert lítil løta, til hann var runnin upp av hundinum, greiðir vakthavandi á støðini frá.

Av tí at løgreglan ikki var greið yvir, hvør av teimum báðum, sum í bilinum vóru, hevði koyrt, tók hon báðar persónarnar við á støðina til blóðroynd.



## Vesturkirkjan fylti við maner

*Kirkjufólkið fylti kirkjuna sunnudagin, tá hátíðargudstænastan varð hildin*

Jústinus Leivsson Eidesgaard

**Tórshavn:** Vesturkirkjan hevur trúgvar kirkjugangarar. Vanligar sunnudagar eru millum 3-400 fólk í kirkju, men sunnudagin var hon stúgvandi full, eini 800 fólk vóru í kirkju.

Og tað var lagt upp til eina rætta hátíðarløtu. Kórið var fult av prestum, bæði teir sum starvast í kirkjuni í dag og eisini fyrrverandi prestar. Sálmasongurin lyfti næstan tekjuna omanav, tá fullsetta kirkjan saman við mannskórinum sungu mergjaðar sálmar.

Hans Jacob Joensen, biskupur minti okkum á í prædiku síni á hvør Gud er. At tað ikki dugir at seta Gudi treytir og at Gud er óbroytiligur og at menniskjan ikki kann ávirka Gud. Hann brúkti tekstin úr Hebrearabrævinum, har myndin, at tað er ikki listaverkið, sum sigur listamanninum hvussu hann skal gera, men øvugt, varð tikin fram. »Soleiðis er við Gudi,« segði biskupur, »tað er ikki menniskjan sum kann seta Gudi treytir, men øvugt.«

Heri Joensen, høvuðsprestur í Vesturkirkjuni prædikaði yvir dagsins teksti á sínum eyðkenda sjarmerandi ráma svínoyarmáli. Bergur D. Joensen, prestur endaði hátíðargudstænastuna.

Aftan á var kirkjukaffi í kjallaranum og nógv fólk hugnaðu sær.

## Tinghúsviðurin mundi brent inni

Sveinur Tróndarson

Fríggjakvøldið fekk alarmsentralurin boð um, at tað var eldur í gamla timburhandlinum í Runavík. Bygningurin, sum stendur á bryggjuni, er tann, sum Lynfrost og Netavirkið eisini hava hildið til í, og sum Fiskavirking nú eigur.

Tað var kortini ikki her, tað brann, men í miðhæddini. Tað er henda hæddin, sum leggur hølið til nýggja timburklædningin, sum skal setast á Tinghúsið. Og sum skilst, so var tað heppið, at nýggi timburklædningurin ikki brendi inni.

Av løgreglustøðini í Runavík frætta vit, at tað var í tøkum tíma, at eldurin varð uppdagaður. — Men tað gekk skjótt at sløkkja og tíbetur hevði eldurin ikki fest í klædningin, sigur vakthavandi.

Tað er Mogens Skoradal, málarameistari, sum eigur uppgávuna at mála nýggja tinghúsklædningin. Hann greiðir frá, at kædningurin var ikki tespiligur at síggja til, tá eldurin var sløktur, men at tað bert var uttaná.

- Viðurin hevur tíbetur ongan skaða fingið. Tað var bara sót tað heila, og tí ráddi um at fáa vaska viðin. Loyvið var fingið og tí er alt longu vaska og lagt til turkingar, greiðir hann frá.

Tað merkir, at tað ikki ganga nógvir dagar, til arbeiðir við at mála kann byrja aftur.

Mogens Skoradal heldur kortini, at tað var ómetaliga heppið, at tað ikki brendi alt sum tað var.

- Har eru gipsplátur undir loftinum, og sum eg skilji, so eru tær orsøkin til, at eldur ikki hevur breitt seg. Hevði hann tað, so hevði ikki verið sprek eftir av nýggja tinghúsklædninginum, sum er fingin til vegað úr Noregi.





# Privati kapitalurin sigraði einsamallur í oljumálinum

*Hvør átti dagin 17. august 2000?*



17. august vórðu fyrstu loyvini til leiting og framleiðslu av kolvetni í føroysku undirgrundini givin á samkomu í Norðurlandahúsinum, har Eyðun Eltør, landsstýrismaður handaði loyvini. Nógv fólk var, sum vera man, komið saman bæði her heimanífrá og úr útlondum.

Eisini rættiliga nógvir politikkarar høvdu leitað sær niðan í Norðurlandahúsið, men vóru tó fámentir í mun til allar teir nálastrípaðu, sum umboðaðu oljufeløgini. Og hetta var eisini teirra dagur burturav. Eg kundi ikki lata vera við at hugsa um, hvussu stórur partur av hesari vælklæddu samkomu mundi hugsa um, hvussu føroyski pallaba kundi tryggjast at fáa sum mest burtur úr hesi nýggju vinnu? Men hin vegin, var tað nú teirra uppgáva?

Søguligur var dagurin, ongin ivi um tað, men eg má siga, at tað sanniliga var við blandaðum kenslum, at henda løta varð eygleidd. Hetta var dagurin, tá ein meiriluti á Føroya Løgtingi lat ein veruligan almennan møguleika gleppa okkum av hondum. Ein møguleiki, har almenna Føroyar kundi gjørst virkin partur av einari føroyskari oljuvinnu. Hetta var dagurin, tá almenni føroyski oljuídnaðurin gjørdist privatur.

### Tvey privat oljufeløg - og einki alment

Gaman í, tvey føroysk oljufeløg vóru partar av útlendskum oljusamtøkum, sum fingu loyvi, men almenna Føroyar var ikki við. Føroyska umboðanin var latin til Atlantic Petroleum og Føroya Kolvetni, sum bæði eru privat feløg, meðan felagið hjá vanliga føroyinginum ikki var við. Sjálvandi kann onkur siga, at tað er bara at bjóða seg fram sum partaeigara í hesi føroysku feløgunum. Men partaeigarar hava nú einaferð allir tað til felags, at teir eiga pengar, sum teir hava ráð til at seta í eitt felag.

Atlantic Petroleum og Føroya Kolvetni hava gjørt rætt. Tey hava tikið av einum møguleika, sum politiski meirilutin hevði givið teimum - politikkararnir høvdu tæað teimum lendið. Og privatu áhugamálini hjá áðurnevndu feløgum hava ikki forðað vanliga føroyinginum at verið við í einum almennum føroyskum oljufelag, men 17 tingmenn hava forðað øllum føroyingum henda møguleika. Tá politiska hagreiðingin gjørdist, sum hon gjørdist, so má sigast, at tað var hóast alt gleðiligt, at nøkur fá føroysk áhugamál vóru umboðaði.

### Hetta ynskti samgongan

Tað, sum eg her sipið til, er, at sjálvandi skuldu vit havt tryggjað okkum við einum almennum føroyskum oljufelag, sum skuldi havt optión í øllum givnum loyvum. Og júst soleiðis ljóðaði uppskotið, sum ein minniluti í vinnunevndini skjeyt upp. Minnilutin (Alfred Olsen, Henrik Old pg Katrin Dahl Jakobsen) mælti til, at § 3 fekk eit nýtt stk. 2, sum var soljóðandi: „ Í loyvum sambært stk. 1 skal landsstýrismaðurin treyta sær, at eitt møguligt alment føroyskt oljufelag skal kunna fáa ein part í loyvinum (optión), sum er millum 1% og 5%.“

Men hetta uppskot fekk bert 14 atkvøður (Javnaðarflokkurin, Sambandsflokkurin og Miðflokkurin), meðan 17 vóru ímóti (Tjóðveldisflokkurin, Fólkaflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin). Og sostatt hevur sitandi samgonga sagt, at tað almenna skal ikki aktivt inn í eina føroyska oljuvinnu, og at hesin rættur skal falla til tey fáu útvaldu í Føroyum, sum sita inn við kapitali.

Og uppskotið var nú bert at lata upp fyri einum almennum møguleika - men gakk.

### Hvat gjørdu norðmenn?

Áhugavert er at siggja í bløðunum, at norski forsætismálaráðharrin Jens Stoltenberg í røðu síni, tá hann setti oljuráðstevnuna í Stavanger m.a. segði, at fyri 100 árum síðan var Noregi eitt fátækt land, men at farna øldin er søgan um, hvussu teir arbeiddu seg burtur úr vesældóminum. Víðari segði hann, at útlendski pengarnir, vitanin og ráðgevingin vóru neyðug. Men at teir syrgdu eisini alla tíðina fyri, at eftirlit og eigaraviðurskiftini vóru á almenum hondum.

Og hetta kundi eisini verið okkara leistur, um enn í minni málistokk.

Poul Mohr nýtti eina so góða mynd við monnunum undir neystavegginum í einari blaðsamrøðu. Og tað er rætt, at har nyttar ikki at standa, men nú er bara støðan tann, at nakrir fáir eru slopnir upp í part, meðan vanligi føroyingurin verður standandi undir neystavegginum. Ikki tí, at hann ynskti tað, men tí at ein meiriluti á tingi ynskti hann standandi undir neystaveggin.

Hyggja vit í bløðini, sum í dag skriva um hesa nýggju avbjóðing, so eru ikki longur føroyskir politikkarar millum teir, sum úttala seg. Og orsøkin er tann einfalda, at føroysk oljuáhugamál eru ikki longur almenn, sum politikkarar skulu taka sær av. Vit hava avreitt hetta tilfeingið til tey privatu áhugamálini.

Í staðin síggja vit nú samrøður og myndir av nýggju fólkunum í føroyskari oljuvinnu m.a. Poul Mohr, Kjartan Hoydal, Olaf Olsen og Niels Sørensen. Teir hava so teirra lógligu áhugamál at røkja, men neyvan eru tey fóksins áhugamál.

Líkt er til, at hugtakið **„fólksins ogn“** fyri samgonguna hevur ein heilt annan týdning, tí støðan í okkara fiskivinnu er uppaftur meira døpur.

**Jóannes Eidesgaard**

HYGG HER

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI MOTORS
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

Brúktir bilar til sølu

| Verksmiðjumerki | km. | mán. | árg. | søluprísur |
|---|---|---|---|---|
| Toyota Camry STC 2.0 AVHEINTINGAR-TILBOÐ | 160.000 | Aug. | 1987 | 9.000,- |
| BMW 316 (1.6) EILER | 30.000 | Juli | 1997 | 129.000,- |
| Suzuki Baleno Van | 35.000 | Aug. | 1997 | 75.000,- Við MVG |
| Ford Escort Diesel | 86.000 | Aug. | 1996 | 103.500,- |
| Citroën BX 1.9 Diesel | 185.000 | Aug. | 1991 | 65.000,- |
| Opel Astra 1.6 GLS | 66.000 | Sept. | 1995 | 99.900,- |
| Citroën Xantia 3.0 V6 | 34.500 | Juni | 1998 | 180.000,- |
| MAZDA 323 1.5 SEDAN | 2.500 | Mars | 2000 | 145.000,- |
| Mitsubishi Lancer Diesel | 189.500 | Juli | 1990 | 23.000,- |
| BMW 320i AVHEINTINGAR-TILBOÐ | 216.300 | Mai | 1987 | 19.000,- |
| GALLOPER 2.5 Tdi - 7 pers. | 37.400 | Apríl | 1999 | 215.000,- |
| GALLOPER 2.5 Tdi 3H VAN | 38.700 | Feb. | 1999 | 165.000,- Við MVG |
| Fiat Scudo 1,9 TD | 130.000 | Mars | 1997 | 130.000,- Við MVG |
| Citroën ZX 1.9 D Stw. | | Feb. | 1995 | 89.000,- |
| FORD FIESTA | 114.000 | Mai | 1989 | 23.000,- |
| Citroën ZX 1.4i IMAGE | | Jan. | 1996 | 60.000,- |
| OPEL ASTRA 1.7 TURBO DIESEL | 81.000 | Des. | 1996 | 115.000,- |

OG FLEIRI AÐRAR BRÚKTAR BILAR SO HYGG INN Á GÓLVIÐ OG FÁ EITT GOTT TILBOÐ!

AVHEINTINGAR-TILBOÐ
ISUZU PICK UP 4X4 • 226.500 km.
Árg. Okt. 1989 • Einans kr. 15.000,-

Vælkomin til

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI MOTORS
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

Hoyvíksvegur 63 - FO-100 Tórshavn - Tel. 313666 - Fax 310866